# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.01.2017*

**Bygdaráðsfundur: 30.01.2017 kl. 16.30 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 1/2017 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.22.00-A21-4-17
**Malslýsing**
Bygdaráðið skal velja eina valnevnd. Í valnevndini seinasta valskeið vóru: Ólavur Magnussen, Magnus í Hjøllum, Anna Malena Højgaard, Vilmund Jacobsen og Álvur Højgaard. Varalimir vóru: Jansy Olsen og Julianna á Hálvmørk.

Valnevndin skipar seg í flestu førum sjálv við formanni, men í lógini um val til fólkatingið av 30. juni 1993 er ásett, í kap. 5 grein 19 stk. 3, "at millum limirnar í valnevndini, velur Bygdarráðið formannin í valnevndini".

Seinastu árini hevur bygdaráðið valt Ólavur Magnussen, sum formann í valnevndini fyri fólktatingsval, og tá valnevndin hevur skipað seg, er Ólavur eisini valdur til formann til onnur val.

**Tilmæli**
Á fundi 24.01.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at valnevndin verður tann sama sum seinasta valskeið.

Í mun til Fólkatingsvalið mælir Fíggjarnevndin til, at Ólavur Magnussen verður formaður í valnevndini fyri fólkatingsval.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum og Kaj Eli Hansen vóru úti, meðan málið varð viðgjørt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.01.2017*

**Mál nr. 2/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.22.00-A21-5-17

**Málslýsing**

Bygdaráðið skal geva heimild til at undirskriva kommununar vegna, samb. § 44 stk. 2 í kommunustýrislógini. Seinasta valskeið vóru tað borgarstjórin og skrivarin, sum høvdu heimild til at undirskriva.

**Tilmæli**

Á fundi 24.01.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at borgarstjórin og skrivarin fáa heimild til at undirskriva kommunurnar vegna hetta valskeiðið.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 3/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J. nr. 00.22.00-A21-6-17

**Málslýsing**

Í sambandi við, at bygdráðið hevur viðtikið at strika Vinnunevndina, er neyðugt at dagføra kommunustýrisskipanina samsvarandi, vísandi til § 5 í kommunustýrislógini. Uppgávurnar, sum vóru undir Vinnunevndin, eru lagdar út til aðrar nevndir.

**Tilmæli**

Á fundi 24.01.2017 mælir Figgjarnevndin til at taka undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2017 Havnir og Floghavnir**

J.nr. 08.14.00 – Ø09-1-17

**Málslýsing**

Rakstrarætlan fyri 2017 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Høvuðstølini í rakstrarætlanini eru hesi:**

| **Inntøkur:** | **Ætlan 2017** | **Ætlan 2016** | **R 2015** |
|---|---|---|---|
| Netto inntøkur | 712.500,00 | 637.500,00 | 786.148.00 |

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.01.2017*

| **Útreiðslur:** | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| Rakstrarkostnaður | -287.400,00 | -293.750,00 | -282.350,00 |
| Rentuinntøkur | 500,00 | 2.000,00 | 88,00 |
| **Ársúrslitið** | **425.600,00** | **345.750,00** | **503.886,00** |

**Tilmæli**

Á fundi 24.01.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við rakstraætlanini fyri 2017, hjá Kongshavnar Havn soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.22.00-A21-1-17

**Málslýsing**

Bygdaráðið skal velja umboð í nevndina fyri Musikkskúlan.

**Tilmæli**

Á fundi 21.01.2017 mælir Mentanarnevndin til, at forkvinnan Elin á Torkilsheyggi, og Høgni Hansen, næstformaðurin í Mentanarnevndini, verða umboð í Musikkskúlanum hetta valskeiðið.

**Avgerð**

Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál  nr. 6/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr.02.34.02-P20-46-16

**Málslýsing**

Í skrivi  27.10.2016 søkir Eyðfinn Johannesen um loyvi til at ogna sær grundstykkið á Lýðarsvegi 14 matr. nr. 408b. Stykkið er 847m² til víddar.

**Tilmæli**

Á fundi 21.01.2017 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið  at selja víðari til Eyðfinn Johannesen.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.01.2017*

**Mál nr. 7/2017 Ognir og hølir**
J.nr.82.20.00-P20-1-15
**Málslýsing**
Teknistovan í Gøtu hevur, vegna Nes kommunu, biðið um tilboð uppá kavafang til tekjuna á barnagarðinum.

Í skrivi 14.12.2016 er tilboð komið frá Byggivirkinum KBH áljóðandi kr. 84.000 við 6,25 % mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 21.01.2017 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Byggivirkinum KBH, uppá kavafang til barnagarðin, áljóðandi kr. 84.000.

Á fundi 24.01.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at arbeiðið verður fíggjað við tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 8/2017 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.00.00-P07-1-17
**Málslýsing**
Tekniski leiðarin hevur havt samskifti við Biofar um at gera botnkanningar í sambandi við, at kommunan fer at keypa grót frá Tunnilsfelagnum, sum ætlanin er at brúka á havnalagnum.

*Uppá fyrispurning, frá tekniska leiðaranum hjá kommununi, svarar Biofar, at roknað verður við tveimum døgum við góðveðri til kavingararbeiðið. Umleið tvær viku seinni er frágreiðingin væntandi liðug. Kostnaðurin er mettur til umleið 95.000,- kr + MVG.*

**Tilmæli**
Á fundi 21.01.2017 mælir Tekniska nevnd til, at Biofar ger botnkanningarnar fyri ein mettan kostnað á umleið kr. 95.000 + mvg.

Á fundi 24.01.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum havnin/íløgur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.01.2017*

**Mál nr. 9/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.34.02-P20-2.17

**Málslýsing**

Í skrivi 12.12.2016 søkir Christian F. Andreassen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 576 á Regnavegnum. Húsini eru umleið 200 $m^2$ í einari hædd + bilhús, sum er 42 $m^2$.

**Tilmæli**

Á fundi 21.01.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Christian F. Andreassen byggiloyvi til sethús á matr. nr. 576, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 10/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.22.00-A21-3-17

**Málslýsing**

Bygdaráðið skal velja umboð í nevndina fyri Barnaverndina.

**Tilmæli**

Á fundi 19.01.2017 mælir Trivnaðarnevndin til, at Rutt V. Olsen og Atli F. Johansen halda fram hetta valskeiðið.

**Avgerð**

Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 11/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J. nr. 00.22.04-A21-5-17

**Málslýsing**

Trivnaðarnevndin hevur í undanfarnu setu havt heimild til at seta starvsfólk á stovnunum, sum hoyra undir barnaansingina, eftir innstilling frá leiðsluna á viðkomandi stovni.

**Tilmæli**

Á fundi 19.01.2017 mælir Trivnaðarnevndin til, at skipanin sum hevur verið, at Trivnaðarnevndin hevur havt heimild til at seta starvsfólk innan barnaansingina, heldur fram. Skipanin hevur virkað væl og gevur eina skjóta arbeiðsliga gongd.

Á fundi 24.01.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini fráTrivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.